# Her er gott at vera

**88 ára gamla Olga Bærentsen úr Havn er ein teirra, sum er flutt inn á nýggja heimið fyri minnisveik í Havn. Hon hevur fingið eitt gott og rúmsátt kamar, sum hon er sera vælnøgd við**

MINNISVEIK
*Snorri Brend*



*Fýra ættarlið savnað saman í kamarinum hjá Olgu: Aftast vm. Gunn Mikkelsen, Elsa Mortensen, og síðani Olga Bærentsen við lítla dronginum, sum verður borin til dópin nú sunnudagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Vallalíð:** Tað er eitt av teimum sera hugnaligu kømrunum, vit eru stødd inni í.

Alt er gjørt klárt til stóru høgtíðina fyri framman: Í vindeyganum eru ljósini tendrað og runt um í kamarinum bera mangir lutir prógv um, at vit eru í adventini og at jólini standa fyri framman.

Tað angar av hugna inni í hesum kamarinum, sum nú verður tað nýggja heimið hjá Olgu. Hon er eitt av búfólkunum á hesum nýggja heiminum fyri minnisveik.

Henda dagin er alt so uppstákað allastaðni, tí nú er tann stóri dagurin upprunnin: Í dag er heimið alment tikið í nýtslu.

Uttanfyri, í teirri stóru høllini, verða røður hildnar, tónleikurin ljóðar og matur er settur fram. Men hesa løtuna er Olga farin inn á kamarið fyri at vísa tveimum umboðum fyri tíðindatænastuna, hvussu tað er innrættað.

- Jú, hetta er eitt gott kamar, sum eg havi fingið. Her er gott at vera í allar mátar, sigur 88 ára gamla Olga, sum hevur búð heima við hús líka til nú.

Henda dagin hevur hon eisini fingið serstaka vitjan, nú dótturin, ommudótturin og langommusonurin eru komin at vitja. Brádliga eru fýra ættarlið savnað saman í kamarinum. Tað má avmyndast!

Olga setur seg eina løtu við langommusoninum í fanginum. Tað er týðiligt at henda løtan er henni góð og dýrabar!

### Nýbrot

Tað hevur tikið sína tíð at koma so langt sum at siga, at hetta heimið nú kundi verða tikið í nýtslu.

Men fríggjadagin í næstseinastu viku var so dagurin komin, tá tann almenna móttøkan skuldi vera. Nógv varð gjørt burtur úr hesum, og tað merktist í takkartalunum at heimið var komið í tøkum tíma.

Tað hevur tikið fimm ár, frá tí at tær fyrstu fyrireikingarnar fóru í gongd, til tey fyrstu búfólkini kundu flyta inn.

Men fyri tey eldru man hetta við tíðini ikki hava havt tað nógva at siga, tí tær umstøðurnar, tey nú hava fingið, eru framúr góðar.

Í talunum var orðið ”nýbrot” ofta tikið fram, og tí hevur ein alla tíðina miðað eftir, at heimið skuldi liva upp til tað, og veruliga gerast eitt heim fyri henda serstaka bólkin av landsmonnum okkara.

- Vit vóna tí, at hetta verður eitt trygt og gott heim fyri búfólkini, samstundis sum tað verður eitt gott arbeiðspláss fyri starvsfólkini, sum tikið varð til í eini av røðunum.

Í heiminum búgva 16 fólk, ella rættari 20 skapningar. Tí umframt tey 16 eldru fólkini eru eisini fýra húsdjór flutt inn í heimið.

### Børn og eldri

Fyri tey avvarðandi er tað eisini ein stórur lætti og tryggleiki at síggja og vita, at teirra nærmastu eru í teimum bestu hondunum.

Hesi starvsfólkini fara at leggja stóran dent á, at taka útgangsstøði í tí, sum hesi eldru kunnu og duga, og síðani arbeiða út frá tí.

Útgerðin og umstøðurnar loyva tí teimum at gera mangt og hvat fyri teim eldru og ikki minst saman við teimum, soleiðis at tey koma at føla seg væl og verða stimbrað so væl sum tilber.

Eitt av tiltøkunum á hesi leiðini eru áðurnevndu húsdjórini, men heimið hevur eisini fingið eitt samstarv við ein av barnagørðunum nærhendis. Og hvat tað samstarvið kann føra við sær, og allir hinir møguleikarnir, ið heimið hevur, tað setur bert hugflogið mark fyri.

### Nýtt heim

Fleiri gestir koma inn at vitja í kamarinum hjá Olgu, sum liggur beint út til stóru høllina har móttøkan er.

Olga situr enn við lítla langommusoninum í fanginum. Men nógv vilja sleppa at heilsa uppá hana, og tí má hon sleppa hesum lítla barninum eina løtu.

Vit takka eisini fyri okkum, og ynskja henni alt tað besta.

Hon brosar til okkum. Hon er fegin um sítt nýggja heim. Eingin ivi um tað!



*Nógv fólk vóru samankomin til móttøkuna næstseinasta fríggjadag í heiminum fyri minnisveik í Vallalíð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*


Toyota Landcriuser 100LE Automatgear

Árg. 28.12.04
Km: 24.000
Motor: 4.2 diesel

Bilurin hevur alla hugsandi útgerð. Luftfjarðar, el-leðursetur og róður, klimaanlegg, multi-cd, 18" BBS alu-felgur og mangt mangt annað.

Prísur: Verður seldur um hóskandi boð fæst.



VR BILAR
Sp/f VR-bilar • Hoyvíksvegur 61
P.O. Box 3130 • FO-110 Tórshavn
Tel 322 110 • Fax 322 111
VOLVO
RENAULT


## Jólagudstænastur fyri menningartarnað

JÓLAGUDSTÆNASTA
*tíðindaskriv*

Javni bjóðar øllum menningartarnaðum og familjum teirra til jólagudstænastu og hugnaliga samveru.

Á jólagudstænastunum luttaka menningartarnaði við sangi og upplestri.

Jólagudstænasturnar verða á hesum støðum:

**Eysturoy:**
Fríggjakvøldið 16. desember kl. 19.00 í Glyvra Kirkju.
Eftir gudstænastuna verður jólahugni við te/kaffi og rísalamande og øðrum.

**Streymoy:**
Leygardagin 17. desember kl. 16.00 í Havnar Kirkju.

**Suðuroy:**
Mikudagin 21. desember kl. 17.00 í Vágs Kirkju.
Eftir gudstænastuna verður jólahugni við te/kaffi og rísalamande á Hotel Bakkanum.

**Norðoyggjar:**
Hóskvøldið 22. desember kl. 20.00 í Christianskirkjuni.
Eftir gudstænastuna verður jólahugni við te/kaffi og rísalamande.